# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur - 2. sunnudag e. trettanda**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Kristine Hestbech
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Sonja Klein, altargangur, skriftamál kr. 10,40
***Vesturkirkjan:*** kl.11, Heri Joensen. Sunnudagsskúli er samstundis í kirkjukallarnum
***Nólsoy:*** kl. 12 Bjarni Bæk, altargangur, skriftamál kl 11.40
***Argir:*** kl. 11 Hanus Simonsen
***Kirkjubø:*** kl. 12.15 Hanus Simonsen altargongd
***Sandavágur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Bøur:*** kl. 11 - altargongd, Inga Poulsen Dam
***Vestmanna:*** kl. 11 Theodor Olsen, altargangur
***Norðskáli:*** kl. 12 John Myllhamar
***Glyvrar:*** kl. 11, Meinhard Bjartalíð, altargangur.
***Fuglafjørður:*** kl. 12, Uni Næs
***Hellurnar:*** kl. 17, altarg., Uni Næs. ***Talvan gongur fyri Bíbliufelagið***
***Gjógv:*** kl. 12 Jógvan Fríðriksson, biskupur
***Klaksvíkar Sjúkrahús:*** kl. 10, Elsa Funding
***Hvannasund:*** kl. 12, altgarg., Elsa Funding
***Norðoya Sjúkrahús:*** kl. 10, Magnus Brahé Jørgensen
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Magnus Brahé Jørgensen.
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen.
***Dalur:*** kl. 12 Jákup R. Hansen
***Fámjin:*** kl. 12 Jónsvein Bech
***Sandvík:*** kl. 18 Jónsvein Bech
***Sumba:*** kl. 11 Símun Jacobsen
***Leiti:*** kl. 12.15 Símun Jacobsen
***Hov:*** kl. 12, altarg.,
***Eldrabýlið í Vági:*** kl. 14, altarg., Patrick de Neergaard

**Konfirmantarnir á várið 2008 í Norðoya vestara prestaragjaldi**
byrja at ganga til týsdagin 22. januar 2008 kl. 9 í kirkjukjallaranum í Christianskirkjuni.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti í Filadelfia
http://www.gospel.fo

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti**
Hósdagin kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 guðstænasta, v/Sunnia Poulsen, kl. 12 sunnudagsskúli
Mánadagin kl. 17.15-18 venur barnakórið, kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Ebenezer**
Hósdag kl. 17 Sangvenjing – Barnakórið – Gentir og dreingir 7-9 ár, kl. 20 Ungdómsmøti – Talari: Eli Christiansen.
Fríggjadag kl. 20 Teen-Night.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangeliskt møti – Møti við luttøku av klaksvíksingum – Vitin luttekur.
Mánadag kl. 12.30 Andakt
kl. 20.00 Kvinnumøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Hósdagin kl. 20 heimaforbund fyri allar kvinnur.
Fríggjadagin kl. 19 privatmøti fyri tilhoyrandi og soldátum.
Sunnudagin kl. 11 halgunarmøti, kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin í Frelsunarherinum.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bíbliugransking og barnabíbliutími.
Kl. 11 gudstænasta, Aase B. Olsen.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Poul Joensen, trúboðari, talar.
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Jústines Poulsen.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti v. Christian Joensen, evni: Guð - kærleiki, heilagur, rættvísur.
Missiónsvikan er í døgunum 20. - 27. januar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Hera Kjærbo. Sangur: Árni, Natasha og Ingmar.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin í KFUK: Bíbliutími við Jenny Lydersen og Selmar Jacobsen.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti har Símun Absalonsen talar.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti, evnið er »Nýtt ár við familjunum« Pauli Olsen talar.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Jens Wang talar um evnið »Er tað ok at ivast«.
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
kl. 12 Sunndagsskúli
Týskvøldið verður møti kl. 20 á Brekku, Poul Guttesen undirvísir um »Bønarlív Jesusar«.
www.livdin.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hósdagur 17. januar kl. 20 Samtalumøti (Gal. 5)
Fríggjadagur 18. januar kl. 20 Ungdómsmøti v/ Snorri Brend – Kallið frá Guði og tíðin, áðrenn hann og Turið fóru til Tansania.
Sunnudagur 20. januar kl. 11 Sunnudagsskúli.
Sunnudagur 20. januar kl. 18 Møti við Frants Jensen, Fuglafjørður.
Sí annars www.koma.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Hóskvøldið kl. 19 Alphaskeið.
Leygardagin kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgun Gudstænasta - Mariann Jacobsen talar, 11.30 Barnagudstænasta
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónsvika í Sandavági**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Heri Tróndheim, Argir talar. Streingjakórið úr Vágum syngur.
Fríggjakvøldið kl. 19 Møti, Bjartur Johannesen, Skála talar. Sólfríð, Óluva og Jona Ásvør syngja. ***Innsavnan til heimamissiónina. Drekka.***
Kl. 20.30 Ungdómsløta við luttøku av Bjartur Johannesen, eisini er sangur og vitnisburður.
Leygarkvøldið er onki møti vegna valið.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ altarg. kl. 14 Familjusunnudagsskúli v/ sun. sk.ráðgeva Marjon Nielsen, kl. 18 Møti, Niels J. Nielsen, trúboðari talar. Stranda sangkór syngur. Innsavnan til Meinigheitshúsið.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hósdagur kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagur kl. 11Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Hósdagin 17/1 byrjar barnaarbeiðið aftur í Saron, klokkan 19.
Sunnudagin 20/1 - evangeliskt møti klokkan 18. Samkoman Immanuel í Hoyvík luttekur.
Drekkamunnur aftaná møti.
Verið vælkomin.

**Missiónsvika í missiónshúsinum í Vestmanna 15. – 20. jan. 2008**
Hósdagur 17. jan. kl. 19.30 bønarmøti, kl. 20 møti við sangbólkinum Miktam.
Fríggjadagur 18. jan. kl. 19.30 bønarmøti, kl. 20 møti við KFUM og -K kórinum úr Klaksvík, innsavnan.
Leygardagaur 19. jan. kl. 18.30 bønarmøti, kl. 19 møti við sangi og vitnisburði.
Sunnudagur 20. jan. kl. 11 Guðstænasta og sunnudagsskúli í kirkjuni, kl. 17.30 bønarmøti, kl. 18 møti við Streingjakórinum úr Vágunum.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14, møti verður kl. 18.
Bíbiltími týskvøldið kl. 20
Bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Saron Haldórsvík**
Hósdagin 17/1 húsmøti hjá Elianu og Magnus Olsen, kl. 20. Ver hjartaliga vælkomin.

**Kirkjukjallarin í Gøtu**
Leygarkvøldið 19/1 kl. 20 Ungdómsmøti við Boga Olsen
Sunnudagin 20/1 kl. 17. Familjumøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Vælkomin á ungdómsmøti leygarkvøldið kl. 20, Frits Thomsen talar um frelsuvissu, sangur og undirhald verður eisini. Drekkamuður aftaná.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli. Kl 19 møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 21, Bøn og lovsangur.
Leygarkvøldið kl. 21, Awake, ymisk luttøka.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Martin Olsen. Manskvartett syngur. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Hósdagur 17. jan. kl. 20 Bønarløta.
Øll eru hjartaliga væl komin.
Vikuskiftið 25. – 27. januar 2008 skipar Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum fyri bygdalegu í Nesvík, øll eru hjartaliga væl komin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Hósdagin kl. 18 Tim5.
Sunnudagin kl. 17 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Hósdagur kl. 20 Bønarløta.
Fríggjadagur kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnudagur kl. 17 Sunnudagsskúli, kl. 17 møti v/Olgu Magnussen, Lamba.
***Vikuskiftið 25. – 27. januar 2008 skipar Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum fyri bygdalegu í Nesvík, øll eru hjartaliga væl komin.***
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kambsdalur**
Hesi møtir verða hildin í handilsskúlanum á Kambsdali
Sunnumorgun kl. 11, breyðbróting.
Týskvøld kl. 20, bønar- og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið í Rituvík Missiónsvika í Rituvík**
Hósdagin 24. jan. kl. 20 Meinhard Bjartalíð talar
Pauli og Dania Berthelsen og Beinta Atladóttir Jacobsen syngur.
Fríggjadagin 25. jan. kl. 20 Unn Justinusen talar - Streingja kór í Gøtu syngur
Leygardagin 26. jan. kl. 18 Barnamøti v/Hansu Mariu og Petur Hans Hansen.
Kl. 20 Bartal Danielsen talar
Kór úr Rituvík syngur
Sunnudagin 27. jan. kl. 11 Familjugudstænasta v/ Meinhard Bjartalíð
Altargongd.
Kl. 18:00 Torleif Johannesen talar - Glyvra Streingjakór syngur.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið 20. januar kl. 18 - verður syngið við kvøld, vit fara at »syngja sangirnar vit ongantíð gloyma«
Á skránni verður m.a.
· Andakt
· Barnakór
· Felagssangur
· Solosangur
· Drekka
Missiónsvikan byrjar týsdagin 22. januar kl. 20.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøld kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnukvøld kl. 18 møti.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti og bíbliutími.
Tú ert vælkomin.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Poul Nicolai Steinberg.
Sunnnudagin kl. 18 møti við Poul Nicolai Steinberg.
Barnamøti er samstundis
Hvønn gerandismorgun kl. 6:15 er morgunbøn.

**Betania, Skopun**
Hósdagin Bønarmøti kl. 19.
Leygardagin Barnamøti kl. 14.
Sunnudagin Morgunmøti kl. 11.
Sunnudagin Sangmøti kl. 18. Ymisk luttøka úr Sandoynni.
Mánadagin 21/1 Kvinnumøti Kl. 20.

**Aglow Suðuroy**
Møti verður í Bygdahúsinum í Lopra fríggjakvøldið 18/1 kl. 19.30.
Allar kvinnur hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið, Vágur**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Jógvan Højgaard, trúboðara.
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjamorgun kl. 9.30 orðið á borðið.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og sunnudagskúli. kl. 18 evang møti, Torhild & Niels Edvard Olsen luttaka.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Møti sunnukvøldið kl. 18 Símun Jacobsen prestur talar.

**Frá Missiónshúsinum í Porkeri.**
Fríggjakvøldið 18. jan. kl. 21 verður ungdómsmøti í missiónshúsinum í Porkeri við Ragnar Mortensen.
Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 20. januar verður gingið niðan á Loysingarfjall við Vestmanna. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Minnist til at hava heit og góð gonguklæðir og ein matpakka við. Túrurin er miðaltungur. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425. Í januar og februar hevur Kunningarstovan bert opið kl. 11-17, og leygardag frá kl. 10-13.

**Stovna Føroya Felag í Stóra Bretlandi**
Stig eru tikin til at stovna Foroya Felag í Stóra Bretlandi. Stovnandi aðalfundur verður í hølunum hja donsku kirkjuni í London 2. februar 2008 kl. 16. Adressan hja donsku kirkjuni er: 4 St. Katherine's Precinct, Regent's Park, London NW1 4HH. Eftir aðalfundin verður buffet @ 12£. Vinarliga boða fra luttøku áðrenn 25. januar til: ottar@foroyar.org.uk

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Hósdagur 17. januar***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin: Vit lesa : Í havsins hjarta” Gunnar Hoydal, hittast í dag
14 – 16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 18. januar***
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grethe Harlou
12.00 Døgurði
13.30 – 17.00 Opið hús

**60 ár**
15. februar verður Óli Emil Olsen, Vágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Framtíðini leygardagin 16. februar frá kl. 19. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við Óla Emil verða biðin um at siga frá áðrenn 8. februar á tlf. 266660.

**Føðingardagar!**
Tann 30. januar og 7. februar verða Elsebeth og Knút Nielsen í Vági 60 og 65 ár. Dagarnir verða hildnir í skótahúsinum tann 2. februar frá kl. 19.00. Øll eru hjartarliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 19. januar giftast Magni Blástein og Ena Samuelsen. Vígslan verður kl. 11 í Vestmanna kirkju. Opið hús verður í bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 13-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.